**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 147/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi**
(Skráseting av veruligum eigarum o.a.)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Poul Michelsen hevur lagt málið fram tann 7. mars 2019, og eftir 1. viðgerð tann 14. mars 2019 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 19. og 26. mars 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í vinnumálum, sum hevur víst á, at onkrar broytingar eru ynskiligar í gildiskomureglunum í uppskotinum.

Endamálið við løgtingsmálunum 146/2018 og 147/2018 er í stuttum at seta í verk tiltøk fyri at fyribyrgja, at vinnulóggávvan verður misnýtt til skattaskjól og skattaundandrátt og at hava lógarverk á sama støði sum í grannalondunum og ES/EBS londunum í mun til at fyribyrgja hvítting og fígging av yvirgangi.

Nevndin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

§ 5 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2019.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær § 58 a, stk. 2, 1. pkt., sum ásett í § 1, nr. 4, § 15 g, stk. 2, 1. pkt., sum ásett í § 2, nr. 3, § 56 b, stk. 2, 1. pkt., sum ásett í § 3, nr. 3, og § 17, stk. 4, 1. pkt., sum ásett í § 4, nr. 2, koma í gildi. Landsstýrismaðurin kann áseta skiftisskipanir."

**Viðmerkingar**
Í upprunauppskotinum eru ásetingar um m.a.:
- Feløgini skulu savna upplýsingar um veruligu eigararnar av feløgun, undir hesum rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
- Upplýsingarnar skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya.
- Feløgini skulu goyma upplýsingarnar um veruligu eigararnar í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat, og um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
- Eisini skulu feløgini eftir áheitan útflýggja upplýsingar til Føroya Landfúta um veruligu eigararnar, undir hesum um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar, og skulu harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá ið hesir

myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av teirra eftirlitsuppgávum ella umsjónaruppgávum.

Fíggjarmálaráðið hevur víst á, at í sambandi við at Global Forum skal gera "review" av Føroyum seinni í vár, er tað av stórum týdningi, at reglurnar um, at Føroya Landfúti og TAKS hava atgongd til upplýsingar um veruligar eigarar og TAKS, eru í gildi.

Tað er ikki møguligt, sum er, at skráseta veruligar eigarar í kt- skipan Skráseting Føroya við tað, at kt-skipan Skráseting Føroya ikki er tillagað til tað enn.

Eftir upprunauppskotinum fær landsstýrismaðurin tí heimild til at seta lógina í gildi við kunngerð.

Teir partar av ásetingunum, sum ikki snúgva seg um kt-skipan Skráseting Føroya kunnu tó setast í gildi beinanvegin, hóast kt-skipan Skráseting Føroya ikki enn er tillagað. Hetta fevnir millum annað um reglurnar um skylduna hjá feløgunum at savna og goyma upplýsingar um veruligar eigarar, og skyldan at lata upplýsingar til Føroya Landfúta og TAKS.

Skotið verður tí upp at broyta ígildiskomuásetingina í § 5 í upprunauppskotinum soleiðis, at lógin fær gildi 1. juli 2019, og at landsstýrismaðurin fær heimild til at seta tann partin av ásetingunum, sum viðvíkur skrásetingarkravinum, í gildi við kunngerð.

Hinir partarnir av lógaruppskotinum verða settir í gildi 1. juli 2019, m.a. skyldan hjá feløgunum at savna upplýsingar um veruligu eigarar, og skyldan at lata upplýsingar til Føroya Landfúta og TAKS.

Serligu viðmerkingarnar til § 5 í upprunauppskotinum verða annars óbroyttar.

Ein samd nevnd tekur við hesum broytingum undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 26. mars 2019**

Bjørt Samuelsen
formaður

Jørgen Niclasen
næstformaður

Bjarni Hammer

Ingolf S. Olsen

Bjørn Kalsø

Jákup Mikkelsen

Jógvan Skorheim